FYLGISKJAL 10

LM-065/2023

Til Almanna- & Mentamálaráðið

Tórshavn 10. desember 2023

Hoyringssvar um løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp

Eitt neyðaregg eftir deadline. Tað er fyrsta kenslan, nú ein ætlað broyting í kringvarpslógini er send til hoyringar. Føroysk Miðlafólk geva her í stuttum til kennar okkara sjónarmið um broytingina eins og avleiðingarnar av tí atgerðarloysi, ið hevur valdað alt ov leingi.

Samgonguskjalið sigur, at "miðlalandslagið og Kringvarp Føroya skulu styrkjast."

Realpolitikkurin sigur sambært Almanna- & Mentamálaráðnum, at "endamálið við broytingaruppskotinum er at tryggja, at Kringvarpið so líðandi kemur í fíggjarliga javnvág, og at tryggja inntøkugrundarlagið móti árligum prísvøkstri. Eisini er eitt av endamálunum at lækka gjaldskyldugu upphæddina hjá smærri virkjum og stovnum."

Ítøkiliga merkir hesin politikkurin, at fólk skulu rinda 13 krónur meira um mánaðin fyri KvF, og at smærri virki og stovnar fáa avsláttur í kringvarpsgjaldinum. Eisini verður gjaldið prístalsjavnað, men ikki fyrr enn í 2025.

Hesar 13 krónurnar um mánaðin í eykagjaldi til "likamligar persónar" koma oman á eitt gjald, sum hevur staðið í stað síðan 2016. 150 krónur fyri fólk 24-66 ár, 50 krónur fyri pensjónistar og 0 krónur fyri tey ungu 18-23 ár.

Óneyðugt skuldi verið at víst á aðrar príshækkingar farnu sjey árini, men 13 krónur um mánaðin, 43 oyru um dagin, er ov lágt sett í so máta. At kalla alt í samfelagnum er vorðið dýrari, nógv dømi eru um ógvusligar príshækkingar, men public service skulu føroyingar ikki gjalda meira fyri.

Vit loyva okkum tí at spyrja, hvat varð av orðunum um, at miðlalandslagið og KvF skuldu styrkjast. Hvussu ætlaði samgongan at styrkja miðlalandslagið og KvF, um eingin skal gjalda meira? Um føgru orðini bara røkka til 43 oyru um dagin fyri nøkur aftur fyri ein avsláttur til onnur?

Atgerðarloysi
Landsstýrinum kunnugt verður lógaruppskotið lagt fram, eftir at KvF hevur fráboðað umfatandi sparingar fyri 8,2 milliónir krónur í fíggjarætlanini fyri 2024. Ítøkiliga eina skerda skrá og starvsfólk, sum fingu ætlanarskriv um uppsøgn. Ætlanarskrivini um uppsøgn blivu sum kunnugt tikin aftur fríggjadagin. Men hetta er ikki mátin at styrkja Kringvarp Føroya. Tvørturímóti.

Føroysk Miðlafólk hava fingið upplýst, at henda lógarbroytingin fer at geva KvF 5,3 milliónir krónur í eyka inntøku. Her vanta sostatt smáar tríggjar milliónir krónur fyri at halda status quo.

LM-065/2023

Samgonguskjalið varð undirskrivað 22. desember 2022, og orðingin um KvF skuldi loysa ein trupulleika, ið var væl kendur og fleiri ára gamal. Sparitiltøkini í KvF vórðu framd 14. november eftir óteljandi áheitanir á politisku skipanina um at gera okkurt.

Demokratiska undirskotið
Í hesum umfari er einans broyting í kringvarpslógini send okkum til hoyringar, men sum fakfelag og umboð fyri tey, ið starvast í føroyska miðlalandslagnum, hóma vit eitt ávíst máttloysi í uppskotinum. Her er lítil ambitión. Lítil visjón. Ov lítil vilji at gera veruligan mun.

Í fleiri ár hevur verið staðfest, at miðlalandslagið er fyri hóttafalli. Privatu miðlarnir tódna, og bløð eru nú sum lundi á jólanátt. Journalistisk størv hvørva, og nærum ongin fer longur undir journalistiska útbúgving.

Nú hevur KvF rent seg fast fíggjarliga, men framvegis verður bara framdur hálvur bati, og væntast kann tí, at spariátøkini í KvF fara at endurtaka seg.

Síðan útvarpið og sjónvarpið vórðu løgd saman í 2005, eru ársverkini í KvF minkað úr 115 niður í 77. Nógv dugnalig miðlafólk eru farin aðrar vegir at vinna sær til lívsins uppihald, og ein og hvør sær, at fylgir prístalsjavningin av kringvarpsgjaldinum ikki prís- og lønarvøkstrinum, heldur niðurbræðingin fram, og miðlalandslagið viknar uppaftur meira.

Avleiðingin verður eitt samfelag uttan sterkar fjølmiðlar. Eitt samfelag, har miðlarnir ikki á nøktandi hátt fáa varpað ljós á samfelagsviðurskifti, og sum tí kemur í demokratiskt trot. Eisini arbeiðið hjá KvF at verja mál, mentan og savningarmegina í samfelagnum verður givið upp til skutils við hesi hálvu loysnini.

Vísið visjónina
Hetta lógaruppskotið er lítið annað enn eitt neyðaregg vorpið eftir deadline. Í stóra perspektivinum broytir tað einki.

Tað ikki so frægt sum fyribyrgir aktuellu og akuttu støðuni, KvF er komið í. Føroysk Miðlafólk heita tí staðiliga á alla politisku skipanina um at taka støðuna í størri álvara enn higartil.

Vísið nú, hvørja grundleggjandi visjón tit hava fyri almenna public service-stovninum, føroyskum journalistikki og føroyska miðlalandslagnum sum heild!

Vinarliga

Føroysk Miðlafólk